

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 07 - 2012

# Iran ætlar at steðga tangaskipum

Iran ætlar sær nú at steðga tangaskipum, sum sigla við olju til lond, sum eru við í handilstiltøkunum ímóti landinum. Tingmaðurin Ibrahim Agha-Mohammadadi, sigur við tíðindatænastuna hjá tjóðartinginum, at umsitingin er í ferð við at orða eitt lógaruppskot, sum fer at gera, at tangaskip, sum flyta olju til lond, sum eru við í tiltøkunum ímóti Iran, sleppa ikki ígjøgnum Hormuz-sundið. -Lógaruppskotið er ætlað at svara oljutiltøkunum, sum ES hevur sett í verk ímóti islamska lýðveldinum Iran, sigur tingmaðurin. Hann leggur afturat, at fyribils hava 100 av teimum 290 limunum í tjóðartinginum skrivað undir lógaruppskotið. Iransku hóttanirnar at steingja Hormuz-sundið eru vorðnar støðugt meiri hvassorðaðar, so hvørt sum ES og USA hava hert síni tiltøk ímóti landinum orsakað av teirri umstríddu kjarnorkuverkætlanini. Nøkur lond í Vesturheiminum hava sent herskip til leiðina fyri at forða iranum at steðga skipaferðsluni ígjøgnum Hormuz-sundið. Sundið hevur sera stóran týdning, tí hvønn dag fara skip við umleið 17 milliónum tunnum av olju ígjøgnum tað. Eitt ES-bann ímóti at keypa olju úr Iran kom í gildi sunnudagin, men bannið fær ikki so stóra ávirkan í ES-londunum, tí teir seinastu mánaðirnar hava ES-londini keypt minni og minni olju úr Iran. Í fjør keyptu ES-lond 500.000 tunnur úr Iran um dagin. ES kunngjørdi innflutningsbannið longu í januar. Umframt bannið hava ES og USA sett tiltøk í verk ímóti iranska tjóðbankanum.

